## DAGSINS MEINING

# Trý sjúkrahús

Eftir viðkomandi og ítøkiliga Fimmaran mikudagin er eingin ivi vera um, hvat málið um B6 snýr seg um: at Landssjúkrahúsinum, hóast tað eigur góðar sjúkrasystrar, læknar, leiðslu og onnur starvsfólk, tørvar pengar til tess at kunna virka sum eitt nútímans sjúkrahús.Sjúklingar, avvarðandi og starvsfólk vórðu á einum máli um, at tørvur er á ábótum á øllum LS.

Tað er tí spell, at ein spaki ikki verður nevndur ein spaki, og at veruliga kjarnan í málinum ikki kemur nóg væl fram, og sum vit hava fingið haldgóð prógv fyri, nevniliga at raðfestingin av játtanum til íløgur og rakstur til sjúkrahúsverkið hevur ikki verið tann rætta. Ístaðin fyri fyrst at útbyggja LS, sum er okkara høvuðssjúkrahús, til at kunna vera á nútíðar støði fyri bæði sjúklingar og starvsfólk, hava politikarar spjatt frammanundan avmarkaðu játtaninar til at byggja út øll 3 sjúkrahúsini. Hetta er orsøkin til støðuna á B6. Tað er spell, at hetta ikki kemur meira fram í orðaskiftinum. Tó var tað landsstýrismaðurin, ið ærliga viðgekk, at raðfestingin av játtanum til sjúkrahúsini hevur kanska ikki verið tann rætta, og at hetta møguliga kann vera orsøk til støðuna.

Vit hava fingið tvey nútímans sjúkrahús í Suðuroy og Klaksvík. Tað øvundar eingin teimum, sum brúka hesi. Men skulu vit finna orsøkina til støðuna á B6 eru vit noydd at síggja veruleikan í eyguni. Hesin er raðfestingin av játtanum til samlaða sjúkrahúsverkið. Tað hevur alla tíðina verið greitt, at vit við at fremja so stórar útbyggingar á smærru sjúkrahúsunum hava vit ikki eisini kunnað nøktað tørvin á LS. Ístaðin er játtanin steðgað heilt upp og hetta eru tær miðaldarligu sjúkrahússengurnar, náttborðini og gjósturin eitt ítøkiligt dømi um. Tað er atvoldin til, at 18 sjúkrasystrar siga stopp.

Leiðslan á LS hevur eina torføra uppgávu. Tað er skeivt at geva henni ábyrgdina fyri øllum trupulleikanum. Tí tað eru føroyskir politikarar, sum eiga hesa ábyrgd. Og liggur hon í dag hjá landsstýrinum. At landsstýrið samtíðis hevur skorið blokkin, ið m.a. er brúktur til útbygging av sjúkrahúsunum, niður við nærum 400 mill. kr. er ein so stór politisk bumba, at nettupp stríðið á B6 átti at fest í tað fjúsið. Nú fáa vit so at síggja, um landsstýrið torir at liva við hesi hóttan. Neyvan. Vit fara helst at síggja stóru flokkarnar har hækka játtanina, nú val stendur fyri durum. Alt annað vil vera sjálvmorð.

Alt gott um Fimmaran, men hetta við raðfestingini av útbyggingini av sjúkrahúsverkinum, har útbygging av smærri sjúkrahúsunum hava sett LS aftur í bíðirøðina, er høvuðsorsøk til ta kreppu, ið hevur tikið seg upp. Tí er bara eitt at gera: at hækka játtanina til LS, soleiðis at tey góðu fólk har arbeiða fáa amboð og umstøður, ið hoyra einum høvuðssjúkrahúsi til.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Politisk kannustoyping

**Eilif Samuelsen**



Í oddagrein í Sosialinum í gjár er føroyski Javnaðarflokkurin aftur úti á politisku gongubreytini við lakktaskuni.

Í greinini verður hugleitt um komandi løgtingsvalið, og óbeskednir, sum teir eru, rokna teir uttan himpr við, at tað verður Javnaðarflokkurin, sum sjálvandi verður størsti flokkur, og at tað verða teir, sum fara at leiða eina komandi samgongu. Og tann møguleikin er sjálvsagt eisini til staðar millum fleiri aðrar.

Út frá hesum hugleiða teir um møguligar samgongumøguleikar og siga, at tað kann fara at gerast torført at seta saman eina samgongu. Og so kemur tað áhugaverda: *"B og C tykjast tó at kunna vinna valið einsamallir. Her snýr tað seg nógv um, hvør verður størstur."*

Hesi orðini siga klárt og greitt, at um Sambandsflokkurin verður størstur, so fer Javnaðarflokkurin at gera samgongu við aðrar flokkar. Teir nevna møguleikan A, B, C. *"Hann er sannlíkur, tó at tað kann vera trupult hjá C, fær hann ikki løgmann..."* Sama siga teir um eina samgongu A, C, E. Altso er tað stórt sæð einasta kriteriið og einasta politiska málið at dominera og at fáa løgmann og gerast størstur. Er hetta tann nýggja sosialdemokratiska ideologiin?

Seinastu mánaðirnar hevur Javnaðarflokkurin hildið tað vera mest opportunt at leggja seg meira á sambandsveingin. Eina tíð krøkti hann seg upp í fullveldisskjúrtið, men har varð hann ristur av.

Tað má vera ótrúliga frustrerandi hjá einum sosialistiskum flokki at skula geva seg út fyri at vera miðflokkur og royna at sigla snikkaleysur millum Scylla og Karybdis í strembanini eftir at fáa løgmann.

Teir siga eisini: *"Vil Sambandsflokkurin leggja á eina meira sjálvstýrissinnaða kós, er ikki óhugsandi við A, B og C."* Hertil er at siga, at mótsett Javnaðarflokkinum hevur Sambandsflokkurin eina fasta kós og ein fastan politikk, sum er ásettur í stevnuskránni og í Nýskipanaruppskoti floksins viðvíkjandi ríkisrættarligu støðuni.

Blaðgreinin lifrar eisini fyri Fólkaflokkinum, skammrósar løgmanni fyri hansara diplomati, tí hann kann brúkast at skapa eina lyklastøðu.

Amatørkenda politiska kannustoypingin endar sum ein kriminalroman við tí ótrúliga spennandi niðurstøðuni: "*Skulu vit hava eina samgongu, sum tekur skilabestu avgerðirnar í ríkisrættarliga spurninginum, má hon tí vera A og C saman við antin B ella E."*

Her fáa vit so politisku sálina hjá Javnaðarflokkinum enn einaferð opinberaða og kunnu ásanna, at "Muður mælir tað, hjartað er fult av."

# Nýtt føroyskt kórverk í kirkjuni í Gøtu

**Komandi sunnukvøld, 16. desember, verður nýggja rútmiska kórverkið hjá Jóhan Mortensen, Jólaboðskapurin, framført í kirkjuni í Gøtu**

JÓLAKONSERT
*Tíðindaskriv*



Konsertin verður rættiliga fjølbroytt. Skúlakórið í framhaldsdeildini í Runavík fer at leggja fyri við sínari skrá. Í hesum kórinum, sum nú hevur nøkur ár á baki, eru í ár einir 30-35 sangarar – bæði gentur og dreingir. Nakrir av sangarunum, ið sungu við í fjør, men nú eru farnir úr skúlanum, fara eisini at syngja við. Eitt stórt gentukór, mannað við einum 60 - 70 gentum úr skúlunum á Glyvrum og í Runavík, fer at framføra yndisliga “Ave verum” hjá Mozart. Aftan á tey fer Manskórið á Skálafjørðinum at syngja nakrar sangir.

Eftir eina stutta andakt verður nýggja jólakórverkið hjá Jóhan Mortensen “Jólaboðskapurin” framført. Verkið, sum er eitt sindur meira rútmiskt enn tey undanfarnu, er í fimm satsum. Teksturin í verkinum verður prentaður á baksíðuna á konsertskránni. Eitt stórt blandað kór við einum 60 sangarum fer at leggja fyri. Tey eru við í fyrsta, øðrum, triðja og fimta satsi. Í øðrum satsi fer Marita Joensen eisini at syngja solo. Í fjórða satsi, tá einglarnir syngja fyri hirðunum úti á markini, fer gentukórið í skúlanum á Glyvrum mannað við einum 40 - 50 gentum at syngja. Endasatsurin er ein halleluja-satsur.

Sum vant verður fylgispælstónleikur aftur við kórsanginum. Kórið fer kortini at syngja við síni egnu styrki - uttan mikrofonir. Teir fýra, ið manna fylgispælsbólkin, eru kendir og royndir tónleikarar her á landi. Í onkrum pørtum verða floytur eisini at hoyra.

Konsertin verður í kirkjuni í Gøtu nú sunnukvøldið 16. desember klokkan 20:30.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Nýggja ferðslulógin ein 18 mánaðar long royndartíð - fyri hampafólk!

**Heri Simonsen**

Hans Pauli Strøm, tingmaður segði tað so rámandi fyri góðum hálvum ári síðani í Fregnum: »At Løgtingið er bara eitt stemplikontór! - sum blástemplar eina rúgvu av lógum!«. Og aftaná 18 mánaðir eru farnir aftur um bak, síðani nýggja ferðslulógin kom í gildi 1. juli 2000, er aftur nógv sum bendir á, at hetta eisini var ein lóg sum bara bleiv blástemplað, og koyrd ígjøgnum. Tað ringasta við nýggju ferðslulógini er, at hon javnstillar revsingarnar fyri brot, sum eru gjørd við fríum vilja - og ofta í óflýggjakapi - við brot sum eru gjørd við óvilja - og mangan í arbeiðsørindum. Ein 18-19 ára gamal unglingi, sum við fríum vilja og berum tramanskapi, koyrir 180-200 km/t fær somu revsing, sum tilkomin hampafólk (við óvilja/í ósketni) fáa fyri at bróta eina víkiskyldu.

Maðurin/kvinnan sum brýtur víkiskyldina kann hava koyrt hampuligt í 15, 20, 30 upp í 40-50 ár. Maðurin og kvinnan kunnu verða avhaldandi ella ógvuliga mátahaldandi við rúsdrekka. Men hóast allan teirra hampuliga atburð í ferðsluni gjøgnum øll hesi árini, so skal hetta eina brotið - og tá kann tað eisini vera gjørt í tænastu fyri títt arbeiðspláss - revsast ájavnt við at koyra 180-200 km/t. Eitt brot sum verður gjørt við fríum vilja, og í træmansskapi, skal revsast ájavnt við eitt brot sum verður gjørt við óvilja og í ósketni, eitt brot uttan, at nakað ónt motiv liggur aftanfyri.

### Jólagáva frá einum samdum løgtingi

Tað líkist svartasta ongum! At ein so óetisk og órættvís lóg bara skal rullast ígjøgnum. Eitt annað sum eisini er órættvíst, er at nú verður heldur ikki munur gjørdur á brot á víkiskyldu við hávatonnum og víkiskelti (treytaða!), og víkiskyldu uttan hávatenn og víkiskelti (vanliga!). Persónur ið »bara« brýtur vanliga víkiskyldu, skal (forbarmi seg!) eisini hálast í rættin, og missa ein dag á arbeiðsmarknaðinum. Tað sita mong tilkomin fólk, og fólk í bestu árum og syrgja runt Føroya land í dag. Tey hava koyrt hampuligt og edrúiligt ígjøgnum mong ár. Men so gjørdu tey eitt mistak - tíverri - brutu víkiskyldina (við óvilja/í ósketni) og mistu koyrikortið treytað. Tey fóru á skúlabonk hjá koyrilæraranum saman við teimum 18-19 ára gomlu »helldrivers«. Teir ungu kláraðu teoriina sum ein svisk, men tey tilkomnu blivu brend av, tí tey hava ikki sama førleika at minnast uttan at, sum tann ungi hevur. Mong fólk í 50-árunum og í 60-árunum hava fingið síns lívskvalitet sorlaðan sundur av hesi himmalrópandi órættvísu ferðslulóg. Tey vera revsaði optimalt fyri ikki hava somu evnir at minnast uttan at til eina teoriroynd, sum unglingin ið bara skal fríska 1-2 ára gamlan lærdóm upp aftur.Vælsignaðu 32 løgtingsfólk! Gevið Føroya bilførarum eina jólagávu í rættvísisins navni, og fremjið neyðugu broytingarnar í ferðslulógini. Revsið víkiskyldisbrot á ein sømiligan og rættvísan hátt. Men lat eitt vatntætt skott vera ímillum brot á ferðslulógina, sum eru gjørd við vilja og í træmansskapi, og brot sum eru gjørd í ósketni og við óvilja. Fólk úr øllum Føroyum, í øllum aldri, úr øllum flokkum, ið eru rakt av hesi órættvísu ferðslulóg kunnu skriva til undirritaða á heri-sim@post.olivant.fo ella til postsmogu 111, 110 Tórshavn. Aftaná nýggjár fara vit at langa nevan í borðið, um hetta órættvísi ikki steðgar í stundini!

**N.B.** Brýtur ein løgtingslimur víkiskyldina, rakar ferðslulógin viðkomandi líka svárt og hart!

# Jólakonsertir í Kvívík og Vestmanna



*Høvuðsverkið á konsertini í Kvívík og Vestmanna verður norska jólakantatan: »Í hesi sælu jólatíð«*

*Savnsmynd Jens Kristian Vang*

JÓLAKONSERT
*Tíðindaskriv*

Sunnudagin 16. desember hevur Vestmanna Sangkór konsert í Kvívíkar Kirkju kl.16.30 og í Vestmanna Kirkju kl. 19.00.

Høvuðsverkið á konsertini verður tann sera vakra norska jólakantatan »Í hesi sælu jólatíð« eftir norska tónaskaldið Arne Dagsvik. Kantatan er fyri blandað kór, kvinnukór, manskór, solistar og kamarorkestur. Solistarnir eru Marit Mordal, sopran, og Hans Iversen, bariton.

Hóast henda jólakantatan eru rættiliga nýggj, er hon longu ógviliga vælumtókt í Noregi. Hon er ikki framførd í Føroyum áður.

Haraftrat verða onnur verk og jólaløg á skránni:

Ave Verum, eftir W.A. Mozart,
Locus Iste, eftir Anton Bruckner,
Føgur er foldin, eftir Ingemann og J. Dahl,

Til okkum her á lágum støðum, eftir S.A. Weihe,
Jólaklokkan aftur ringir, eftir Jakob Jakobsen og H.J. Højgaard, og Jul, jul, strålande jul, eftir Edv. Evers og Gustaf Nordquist.

Kór- og orkesturleiðari er Kári Bæk.

# Heimastýrislógin skal dagførast

**Tummas Eli Høj Joensen**



Heimastyriskipanin hevur virkað væl síðan 1948 og tíðin er nú komin, hvar ið hendan skipanin eigur at verða endurskoðað. Millum annað eigur mynduleikin hjá heimastýrinum at verða staðfestur í grundlógini og Føroyar eiga at vera roknaðar sum ein sjálvstýrandi tjóð í ríkinum.

Ein endurskoðan av ríkisrættarligu viðurskiftunum eigur at verða gjørd í nærmastu framtíð, soleiðis at viðurskiftini verða greið, har tey eru torskild ella kanska beinleiðis ógreið. Vit skulu hava innlit í okkara fíggjarviðurskiftir. Vit skulu hava størri uttanríkispolitiska ávirkan, og okkara rættarskipan skal varveitast. Hetta samsvarar alt við Nýskipanaruppskot Sambandsfloksins.

### Broytingar í rættarskipanini

Kanska okkara lógarkønu vilja hava broytingar, ið kunnu gera tað léttari á onkrum økjum og skulu hesar broytingar sjálvandi gerðast, um tað tænir føroyska fólkinum. Men Føroyar eru eitt so lítið land, at tað má metast sum ein fyrimunur fyri rættarskipanina, at hon er partur av einum ríki har, 5 mill. fólk búgva, heldur enn 46.000 fólk. Hetta sigi eg tí eg vænti ikki, at ein skipan hjá 46.000 fólkum virkar leingi, uttan at gegnistrupulleikar (innhapilitetstrupulleikar) stinga seg upp.

Gegnistrupulleikar kunnu jú fáa rættiliga álvarsligar fylgjur fyri rættartrygdina hjá tí einstaka og tí er hetta við rættarskipanini, rættiliga álvarsligt. Hetta er tí ikki nakað, ið kann fáast upp á pláss við at knipsa við fingrunum, nei, her skulu drúgvar og ógvuliga gjøllar samráðingar til.

### Samstarv tvørtur um landamørk

Vit Føroyingar mugu ásanna eins og nógv onnur fólkasløg, at samstarv tvørtur um landamørk hevur nógv gott við sær, millum annað, økta framleiðslu og búskaparligan vøkstur.

Treyðugt so, onkrar bindingar fylgja við; men hesar bindingar eru hjá teimum flestu til at liva við, tí fyrimuninir eru so nógvir.

Fyrimunir og vansar eru við øllum tøttum samarbeiði. Allar avtalur um samarbeiði eru og verða gjørdar á ein slíkan hátt, at vit heinta og lora inntil báðir partar kunnu siga, at hetta vilja vit góðtaka.

Øll sum fylgja eitt sindur við í politikki vita, at samarbeiðið millum ES-londini bara veksur og tað við slíkari ferð, at ES-nevndin er noydd til at halda eitt sindur aftur, fyri at halda skil á øllum!

Eg haldi, at hetta, uttan at eg nú fari at innlima okkum í ES, skuldi verið eitt talandi dømi fyri okkum Føroyingar um, at tætt samarbeiði við onnur ríkir er nakað, ið eykennir altjóða politikk í dag. Og er tað gott fyri nærum øll onnur lond at samstarva, so skuldi tað verið nærliggjandi fyri okkum at hildi, at tað eisini er gott fyri okkum føroyingar !